## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, seinnapartin minkar hann vindin nakað. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og fyrrapartin ælingur, men seinnapartin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri, sunnudagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 15 stig.

SØGA

# Miseydnaður (vatn)skutari



*Myndamaðurin fekk hesa stuttligu myndina í gjár*
*Mynd: Høgni Thomsen*

Einaferð var tað ein klaksvíkingur, sum ynskti sær so innarliga ein vatnskutara, men hann hevði ikki ráð. Ein vatnskutari kostar tað hvíta úr eygunum. Men hesin klaksvíkingurin fall ikki í fátt. Ístaðin fyri at keypa sær ein veruligan vatnskutara, keypti hann ein vanligan skutara, sum jú er nógv bíligari enn at keypa sær ein vatnskutara.

Síðani koyrdi hann við fullari ferð út í sjógvin við sínum flotta nýggja skutara. Nú skuldi hann veruliga njóta ta frísku havluftina og merkja havsins brúsan móti andlitinum. Men...bjørtu vónirnar brustu so skjótt, sum skutarin bar við vatnið.

## Misskilt endamálsorðingina

Í gjár fór ein bilur á sjógv á Skálatrøð. At síggja til sá tað næstan út sum um, at bilurin var á veg upp úr sjónum, men tað var altso ikki støðan í hesum førinum. Tað sær út sum, at bilurin hevur gloymt, at hann hoyrir til á vegnum og ikki í sjónum. Helst hevur onkur misskilt endamálið við einum bili - at ferðast á landi og ikki í sjónum.

Løgreglan veit ikki akkurát hvat er hent, men teir ganga út frá, at bilurin er farin á rull frá parkeringsplássinum og so á bláman.

- Helst hevur bilførarin gloymt at trekt hondbremsuna, ella er hon glopp-in úr, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

Í herinum hava tey eitt, sum tey rópa amfibiakfør, sum eru gjørd til at koyra á bæði á landi og sjógvi, men í hesum førinum kunnu vit róliga staðfesta, at tað var ikki talan um á Skálatrøð í dag.

- Bilurin er helst rullaður heilt oman og er endaður oman á einum báti. Hann hekk síðani fastur í kantinum og fór ikki heilt á sjógv, sigur vakthavandi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 25 |
| Athen | -- |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 15 |
| New York | 20 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. í útsynning sunnan úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.




**Í dag:**
Djúpa lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað. Lágtrýstið vestan fyri Írland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 8/10 kl. 06⁰⁰– 9/10. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í oktober: - -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 8/10 kl. $06^{00}$– 9/10 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

## VESTFALLSKYRRINDI

6. oktober Mánin næstur jørðini
7. oktober Fullmáni
14. oktober Seinna kvarter
19. oktober Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. Okt | 09.45 | 22.14 | 08.45 | 21.14 | 09.00 | 21.29 | 11.45 | - | 00.17 | 12.45 | 08.00 | 20.29 | 07.00 | 19.29 | 10.00 | 22.29 | 11.00 | 23.29 | 09.30 | 21.59 | 10.45 | 23.14 |
| 11. Okt | 10.43 | 23.12 | 09.43 | 22.12 | 09.58 | 22.27 | 00.14 | 12.43 | 01.14 | 13.43 | 08.58 | 21.27 | 07.58 | 20.27 | 10.58 | 23.27 | 11.58 | - | 10.28 | 22.57 | 11.43 | - |
| 12. Okt | 11.41 | - | 10.41 | 23.08 | 10.56 | 23.23 | 01.12 | 13.41 | 02.12 | 14.41 | 09.56 | 22.23 | 08.56 | 21.23 | 11.56 | - | 00.27 | 12.56 | 11.26 | 23.53 | 00.12 | 12.41 |
| 13. Okt | 00.08 | 12.36 | 11.36 | - | 11.51 | - | 02.08 | 14.36 | 03.08 | 15.36 | 10.41 | 23.31 | 09.41 | 22.31 | 00.23 | 12.51 | 01.23 | 13.51 | - | 12.21 | 01.08 | 13.36 |
| 14. Okt | 01.16 | 13.57 | 00.16 | 12.57 | 00.31 | 13.12 | 03.16 | 15.57 | 04.16 | 16.57 | - | 12.12 | 11.12 | 23.50 | 01.31 | 14.12 | 02.31 | 15.12 | 01.01 | 13.42 | 02.16 | 14.57 |

Sosialurin
5 707265 100036 >